einfaldari

- ger tað einfaldari

Februar 2010

# Kristina og Elsa sum fjakkarar



*Kristina og Elsa ferðaklárar sum fjakkarar*

Fríggjadagin 8. januar fóru Elsa Hansen og Kristina Arge av landinum fyri at fjakka kring um í heiminum. Tær hava valt nøkur lond, sum tær ætla sær at vitja. Mánadagin 11. januar fóru tær úr Danmark við toki ígjøgnum Evropa. Síðan fóru tær til Ísraels at hjálpa til í The House of Hope, sum er eitt blindaheim í Betlehem.

Leiðin gongur síðan til Hongkong, har tær fara at smugla bíbliur inn í Kina. Eftir tað gongur leiðin til Australia, har tær m.a. fara at vitja Hallu Áargarð, sum gongur í skúla har. Ætlanin er eisini at fara ein túr til New Zealand og til Santiago í Chile at vitja Jónu Gunnarsson. At enda fara tær til USA, har tær hava ætlanir um at vitja ymiskar samkomur.

Endamálið við túrinum er at uppliva aðrar mentanir, búnast og læra at standa á egnum beinum. “Sjálvt um vit hava gjørt okkum hugsanir um, hvar vit vilja fara, ynskja vit, at Gud skal leiða okkum, har hann vil, hóast tað skuldi broytt okkara ætlanir”, siga Kristina og Elsa, sum eftir ætlan verða aftur í Føroyum 1. mai. Møguleiki verður at fylgja við túrinum á facebook: Fjakkararnir á ferð.

lívdin
– í livd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Gud er til verka millum okkara

Seinasta hálva árið er ómetaliga nógv hent í Lívdini. Í heyst bóðu vit um tilboð, soleiðis at vit kundu fara í gongd við at byggja. Vit settu okkum stór mál, men í novembur mánaði máttu vit ásanna, at vit ikki megnaðu at náa málinum at fara í gongd við byggingina. Mong av okkum vóru hørm, men ikki vónbrotin. Tá vit í dag hyggja aftur, so muga vit ásanna, at Gud byggir okkara heim og hevur gjørt tað alla tíðina. Bygningin skal Hann reisa, tá ið tíðin er hin rætta. Men Gud er til verka millum okkara og byggir okkum upp til ein livandi bygning - Kristusi til dýrd.

Tá eg hyggi at okkum sum ein livandi bygning, so blívi eg rørdur. Tí hóast vit eru so ymisk og koma so ymsastaðni frá, so uppliva vit gleði, frælsi og kærleika okkara millum. Náði, miskunn og kærleiki eru dygdir, sum binda okkum saman, og sum í øllum ymiskleika fara at bera okkum fram á leið. Hetta er ikki mannaverk, men Guds bygningsverk, sum er í fullum blóma, hóast vit ikki altíð duga at síggja tað.



*Rúni Lómstein*

# Lívdin

## Nýggir sjúkrarøktarfrøðingar

Mánadagin 18. januar tóku lesandi á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum prógv sum sjúkrarøktarfrøðingar.

Millum teirra vóru Valborg H. Laksáfoss, Rini Sivertsen og Tórvør Østerø Vang, sum allar búgva í Hoyvík.



*Valborg H. Laksáfoss*



*Rini Sivertsen*



*Tórvør Østerø Vang*

## Eigil Gunnarsson 90 ár



Hósdagin 28. januar fylti Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Eigil er føddur og uppvaksin í Vági. Í 1940 flutti hann til Havnar, har hýruvognskoyring bleiv hansara lívsstarv. Eigil giftist í 1951 við Jenny, f. Mikkelsen, av Toftum (1924-1999). Tey fingu tríggjar synir: Magnus, Gunnar og Regin. Eigil koyrir bil sjálvur og kemur ofta til ymisk tiltøk og til møtir í Ebenezer og í Lívdini. Eisini gongur hann túrar, serliga á Skálatrøð og í Vágsbotni.

## Lindin 10 ár

Lindin KRISTILIGT KRINGVARP

Kristiliga útvarpsstøðin Lindin fylti 10 ár hósdagin 21. januar. Føðingardagurin varð hildin leygardagin 23. januar við móttøku og beinleiðis sendingum. Í sambandi við 10 ára føðingardagin hevur Lindin fingið nýtt búmerki.

## Halla í Australia



Mánadagin 11. januar fór Halla Áargarð úr Føroyum ávegis til Sydney í Australia fyri at fara á bíbliuskúla hjá Hillsong. Eftir tveir daga steðg í Keypmannahavn fór hon víðari mikumorgunin, og hon kom til Sydney í øllum góðum hósdagin 14. januar kl. 21 lokala tíð (sum er kl. 10 føroyska tíð). Halla verður í Australia til í øllum førum síðst í november.

## Tíðindabræv frá Jónu í Santiago



Samkoman hevur fingið eitt tíðindabræv frá Jónu Gunnarsson, sum er í Santiago í Chile, har hon saman við øðrum ungum ymsastaðni frá í heiminum arbeiðir á barnaheimum, umframt at tey fáa bibliuundirvísing og undirvísing í mentan og sponskum. Jóna kemur heim aftur úr Chile í juni. Tíðindabrævið er á heimasíðuni: www.livdin.fo

## Til lukku við barninum

4. januar fingu Fríða og Bogi Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3.400 gr.



*Tilvildarlig mynd*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli   týskvøld kl. 20.00**

2. feb.  Húsbólkar
9. feb.  Bønarmøti
16. feb.  Skeið fyri vitjandi og nýggj fólk í Lívdini.
23. feb.  Húsbólkar

## Praktisk umsorgan í Lívdini

Hjálparhondin er ein praktisk umsorganartænasta í Lívdini, sum veitir umsorgan, tá onkur hevur átt, tá onkur er álvarsliga sjúkur ella er sjúkur í longri tíð, tá fólk verða rakt av sorg og øðrum umstøðum, sum gera, at tey hava brúk fyri umsorgan.

Hjálparhondin heitir á fólk í samkomuni um at hava eygu og oyru opin, soleiðis at vit sjálvi fylgja við í, hvør hevur umsorgan fyri neyðini. Ynski okkara er, at fólk í samkomuni geva okkum boð um, hvørji fólk hava brúk fyri umsorgan, soleiðis at eingin dettur burtur ímillum. Upplýsingar um tørvir hjá fólki verða altíð viðgjørdir í trúnaði.

Hanna Nielsen tlf. 310155 og fartlf. 510155. mail adr: hangun@post.olivant.fo

Beinta Áargarð tlf. 312655 og fartlf. 512655. mail adr: aargard@kallnet.fo

## Alpha skeið




Frá 10. februar til 28. apríl 2010 verður skipað fyri Alpha skeiði á Sernámsdeplinum á Frælsinum í Havn. Talan er um eina røð av fyrilestrum yvir 10 vikur. Alpha er samanhangandi skeiðsrøð, har ein fær mest burturúr við at luttaka øll skeiðskvøldini.

Tilmelding á mail: alpha.fo@hotmail.com ella tel. 255069. Les meira á: www.livdin.fo

## NTM ungdómsstevna í Onglandi




Frá 26. til 28. mars 2010 verður ein ungdómsstevna í North Cotes í Onglandi. Ert tú millum 16 og 25 ár, so er hetta kanska nakað fyri teg. Fá meira at vita á tel. 217505 ella á heimasíðuni: www.fo.ntm.org

## Samkomulegan á Zarepta




Samkomulegan hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 7.-9. mai 2010. Nærri verður lýst seinni um leguna.

## Samkomuveitslan í Oasuni

Eins og undanfarin ár varð árliga veitslan hjá Lívdini hildin í samkomuhølunum hjá Oasuni leygarkvøldið 30. januar. Talan var um eitt sera hugnaligt kvøld við nógvum undirhaldi, spølum og skemti. Tað er Lív Clementsen, sum er stigtakari og samskipari av veitsluni.



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 7. februar (Hoyvíkar skúli)

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Barnasigning og prát um skeiðvirksemi*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: So flyta vit*
*Talarar: Leiðslan*

** Innsavning til nýggja bygningin*



Guttorm

### Sunnudagin 14. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Flísin í eyganum*
*Talari: Guttorm Joensen*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Happy Valentine*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

Jógvan



### Sunnudagin 21. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í mínum lívi*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: 2010 familjan: Hjúnaband & familjulív*

### Sunnudagin 28. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í mínum lívi*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Lívd-Inn*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*